# Uttanstrok og nýkveikjari

## Ein lýsing av Tony Blair og politikki hansara



*Eftir Hanus Kamban*

***FYRSTI PARTUR***

## Strategisk nýhugsan

### Harold Wilson

Seint á sumri 1964 legði undirritaði saman við trimum øðrum føroyskum unglingum leiðina suður til Bournemouth at nema kunnleika til enskt mál og enskar bókmentir. Nakað av tí fyrsta, vit upplivdu, var at sleppa at fylgja við í einum bretskum politiskum valstríði. Tey Konservativu tá høvdu havt valdið í 13 ár, og Churchill, Eden, Macmillan og Sir Alec Douglas-Home høvdu skiftst um at mynda stjórn.

Tann maður, sum átók sær at føra stríðið ímóti yvirstætt og afturhaldi, var tann nýggi arbeiðaraleiðarin Harold Wilson. Valstríðið var hart, og eingi vápn vórðu spard til at fella Labours knáa Dávid. Wilson vann tó ein ógvuliga tepran sigur og sessaðist í Downing Street við einum meiriluta upp á 4 tinglimir. Tað kendist tó sum ein stórhending, at Labour eftir 13 ár úti á berajóli aftur tók um róðrið í Bretlandi, og eg minnist enn tað næstan rúsandi kenslu av nýbyrjan, sum eyðkendi vinstrabløðini, eitt nú tíðarritið New Statesman, sum eg var farin at lesa.

### Búskapur sum fótongul

Wilson, sum tóktist vera bæði dugnaligur, arbeiðssamur og sprækin, umboðaði eina siðbundna javnaðarhugsan, sum hann greipaði saman við tí, til tað, nýggja hugtakinum *technology*, tøkniligari nútímansgering av Bretlandi. Hansara bragdliga innreið hevði við sær ta kenslu, at nú blástu nýggir vindar, sama bragd av frískligum tíðarskifti, sum dreiv úr tónleikinum og tekstunum hjá The Beatles, sum ein hevði høvi til at hoyra og síggja á konsert fáar mánar seinni í sama býi.

Á valinum hálvtannað ár seinni fekk Wilson økt um sín meiriluta, so hann nú kom upp á 98 tinglimir. Um hetta mundið hevði Wilson-stjórnin tó rent seg í óslættan sjógv. Nógv orka fór til, uttan úrslit, at avbyrgja tað rasistiska stýrið hjá Ian Smith í Rhodesia (seinni Simbabve). Stuðulin til kríggið í Vietnam fekk ilt í vinstravongin, og vánaligur handilsjavni gav stjórnini ridlut støði. Hóast framgongd í búskapinum nakað seinni fall Wilson-stjórnin óvæntað á valinum í 1970. Tann konservativi Edward Heath tók við valdinum og førdi í 1972 Bretland inn í ES.

### Tony Blair

Umframt Wilson høvdu, til stálkvinnan Margaret Thatcher so andbráð, eftir tann sonevnda *winter of discontent*, marsjeraði inn í Downing Street í 1979, tríggir aðrir Labour-leiðarar sitið við valdinum í Bretlandi. Teir vóru Ramsay MacDonald, Clement Atlee og James Callaghan.

Atlee sat við valdinum í stív fimm ár, Wilson í sløk fimm ár, hinir í stytri tíðarskeið. Allar fýra arbeiðarastjórnirnar kollsigldu, tí tær rendu seg í búskaparligt illveður. Tað tóktist vera ein natúrlóg, at Labour megnaði ikki at stýra Bretlandi, og serstakliga at flokkurin hevði ikki lykil til búskaparpolitikkin - høvuðsportrið inn í tað lovaða landið.

Í dag - í okkara merkiligu og torskiltu tíð - er henda natúrlóg sett úr gildi. Fyri einum mána síðani førdi ein spelkin og brasin ríkisovasti Labour inn í Downing Street á triðja sinni. Sigurin var ikki so stórur, sum hann hevði ynskt, men kortini - í tingmannatali - væl størri enn meirilutin hjá Wilson í 1964.

Tony Blair hevur nú havt valdið í Bretlandi í átta ár, longri enn nakar annar Labour-leiðari undan honum. Eydnast tað honum at halda á valskeiðið at enda, hevur hann tá sitið við valdinum í 12 ár. Hann hevur boðað frá, at hann ætlar ikki at halda fram í Downing Street eftir næsta val. Men flokkur hansara kann vinna eitt val aftrat og, kanska við Gordon Brown sum stjórnarleiðara, hava valdið til 2013.

Eg fari í hesi greinarøð, við støði í ævisøguni *Blair* eftir Anthony Seldon, søgufrøðing og rektara fyri Brighton College, at royna at lýsa fyribrigdið Blair, mannin og hansara politikk.

### Tríggir musketerar

Politikkur snýr seg, kunnu vit siga í stuttum, lutvís um at varðveita valdið, og lutvís um at brúka valdið til at fremja nøkur mál. Ella, sagt øðrvísi, um valdið sum mál í sær sjálvum og um valdið sum miðil til nakað annað, eina politiska ætlan. Um vit nú halda okkum til hetta fyrra,




*Alastair Campbell dagin fyri valið í 1997. Campbell var í níggju ár »spunalæknin«, sum skapti miðlamyndina av Tony Blair*

hvussu hevur Blair-stjórnin borið seg at við at vinna trý val og loypa um upp ta høgu og hálu gátt, sum allar Labour-stjórnir higartil eru dotnar um?

Svarið tykist tengt at einum paradoksi. Tony Blair kom inn í Labour sum eitt óskrivað blað, við ongum rótum í hesum flokki, við at kalla ongari politiskari kjølfestu og lítlari søguligari vitan. Hann bleiv valdur inn í Parlamentið í 1983, sum umboð fyri Sedgefield. Hansara dygdir tey fyrstu árini vóru, at hann var tungufimur, høviskur og vinsælur maður.

Men Blair var ikki tornæmur maður. Saman við tveimum vinmonnum og politiskum lagsbrøðrum - Peter Mandelson og Gordon Brown, sum eisini vórðu valdir í 1983 - fór hann undir at granska politikkin hjá Labour, floksins prinsipiella stavnhald, innihald og stíl. Var kanska brúk fyri nýhugsan, hvat stavnhaldi ella borðreiðing viðvíkti? Kundi tað hugsast, at tíðarrákið - hesin bæði gátuførí og strangi harri - nú setti treytir, sum eingin politiskur flokkur hevði ráð til ikki at geva sær far um?

### Tær heilagu kýrnar

Úrslitið av rannsóknunum hjá Mandelson, Brown og Blair gjørdist tann stevna, sum í dag ber navnið New Labour. Sum dømir um, hvat hesin politikkur fataði um, fari eg at nevna tvey prinsipiell mál.

Annað er tað, sum bretar nevna the closed shop. Her verður sipað til rættin hjá yrkisfeløgum til at krevja av fólki í einum virki ella á einum arbeiðsplássi, at tey skulu noyðast at vera limir í einum fakfelag. Eftir at rætturin til at sleppa undan hesi treyt varð staðfestur í tí nýggja sosiala sáttmálanum hjá ES, reistu Tey Konservativu málið í Parlamentinum. Hetta var í 1989, og Blair, sum tá var arbeiðsmálaráðharri í skuggastjórnini hjá Labour, kunngjørdi tann 17. desember, at flokkurin ikki longur stuðlaði yrkisfeløgunum í hesi treyt.

Við hesum ósosialistiska, men klóka stigi ripti Tony Blair eitt vápn úr hondunum á sínum mótparti. Samstundis var tað tog, sum bant Labour at fakfeløgunum, slitið. Óttin fyri yrkisfelaganna "harðræði", sum higartil hevði stygt mangan miðalstættar veljara burtur frá Labour, var nú sum við gandi rikin burtur.

### Burtur frá reinari sosialismu

Hitt málið var tengt at spurning-